

## Pensjónistar ringa jólagávu

Ein vánalig jólagáva til pensjónistarnar. Tað staðfestir Kommunusamskipan Føroya, KSF, nú Løgtingið hevur samtykt at strikað stuðulin úr landskassanum til dagtilhaldini kring landið. Endamálið við hesum er at spara fýra milliónir í almennum útreiðslum. Samstundis væntaði samgongan, at kommunurnar skulu átaka sær at fíggja dagtilhaldini. KSF átalar harðliga, at løgtingið áleggur kommununum nýggjar útreiðslur, uttan nakra fráboðan ella samráðing yvirhøvur. Í tíðindaskrivi staðfestir KSF, at fíggjarætlanirnar hjá kommununum vórðu samtyktar og latnar landsstýrinum farna mánaðarskifti. - Avleiðingin er, at kommunurnar onga trygd kunnu veita fyri, at dagtilhaldini eru opin eftir nýggjár, men helst verða nøkur tilhald stongd, tí eingin fígging er til taks, sigur felagið.

# Bankar ráðgeva út á sjógv

**- Vit hava tørv á einum etiskum ráði, ið kann taka spurningar upp, sum viðkoma borgaranum mótvegis peningastovnunum. Hetta er ikki minst galdandi í tíðum, tá tað sansar at. Peningastovnarnir eiga ikki at sleppa við at ráðgeva fólki út á sjógv – og síðan lata hurðarnar aftur, sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag**

RÁÐGEVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Formaðurin í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard, langar nú út eftir peningastovnunum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í blaðnum fríggjadagin segði formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, at verður næsta ár verri hjá hansara limum enn árið í ár, so verður púra galið, sum hann tók til.

- Hetta árið er eitt heldur vánaligt ár, og fiskimenn eins og aðrir løntakarar eru frustreraðir yvir gongdina. Vit merkja væl, at støðan í landinum er ring. Nógv fólk eru í neyð. Tey fáa ikki endarnar at røkka og spyrja, hvat tey skulu gera, sigur formaðurin hjá fiskimonnum.

### Fatal ráðgeving

Jan Højgaard heldur, at tann ráðgeving, sum fólk, ið hava sett búgv seinnu árini hava fingið, er fatal, sum hann tekur til.

- Fólk eru ráðgivin út á sjógv, og nú tað sansar at fíggjarliga, stendur ikki væl til hjá vanligum verkafólki og fiskimonnum kring um landið, sigur hann.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum vísir á, at síðan peningastovnarnir fóru at geva hesi stóru lánini, sum vóru við til at trýsta prísin á sethúsum upp ígjøgnum, er rentan hækkað, samstundis sum oljan hevur verið dýr – og prísirnir á matvørum hava verið so høgir sum ongantíð áður.

- Fyri bert stuttari tíð síðan bar næstan alt til, men í dag hava peningastovnarnir langað lokið á kassan, og fólk mugu bara klára seg sum frægast.

### Etiskt ráð

Jan sigur, at nú so vanligt er at seta "merki" á hetta og hatta fyri sínar dygdir, skuldu peningastovnarnir eisini verið merktir og bólkaðir – sum góðir ella minni góðir.

- Vit hava tørv á einum etiskum ráði, ið kann taka slíkar spurningar upp, sum viðkoma borgaranum mótvegis eitt nú peningastovnunum. Hetta er ikki minst galdandi í tíðum, tá tað sansar at.

Hann vísir á, at onkur hevur grøn ráð, og onkur hevur burðardygg ráð.

- Peningastovnarnir eiga ikki at sleppa við at ráðgeva fólki út á sjógv og síðan lata hurðarnar aftur – júst, sum um teir einki hava við viðkomandi at gera meira.

Jan sigur, at soleiðis, sum hann hoyrir vanligar borgarar tosa, er ikki líkt til, at peningastovnarnir taka hædd fyri mannalagnum.

- Teir vilja hava sínar pengar – uttan mun til, hvussu teirra ráðgeving hevur verið og uttan mun til umstøðurnar hjá fólki annars. Peningastovnarnir áttu tískil at verið bólkaðir, eisini etiskt, soleiðis at fólk hava ein betri førleika at vita, hvør tað er, tey samstarva við, leggur hann aftrat.

### Hava sína skuld

Formaðurin í Fiskimannafelagnum vísir eisini til ein fund á Hotel Føroyum fyri eini tíð síðan, har eitt nú Jørn Astrup Hansen nam við leiklutin hjá peningastovnunum.

- Táverandi formaðurin í búskaparráðnum og fyrrverandi bankastjórin segði, at bankarnir hava sína skuld í íkomnu støðuni í samfelagnum. Hesum kunnu teir ikki leypa frá.

Jan Højgaard fýlist eisini á danska fíggjareftirlitið, sum hann heldur ikki hevur virkað nóg væl.

# Sleit seks endar og rak á land

**- Sagt hevur verið, at vindmegin í hvirlunum lá um einar 50 metrar um sekundið, men eg haldi, at hetta forslær einki í mun til tað, vit upplivdu her norðuri. Tað ráddi snøgt sagt um at leggja seg niður, tá hvirlurnar komu, sigur Magni Garðalíð, sum eigur bátin Viljan, ið sleit og rak á land í Syðradali**

ÓDN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Beint fyri middagsleitið í gjár fekk báturin hjá Magna Garðalíð og konuni Hanne-Beth á Húsum stóran skaða í havnini í Syðradali.

Glastrevjabáturin Viljin, sum er 43 føtur langur, sleit heilar seks endar, tá ógvuslig hvirla skræddi hann leysan og førdi hann yvir í grótkastið við ferjuleguna.

Magni og Hanne-Beth hava felagið Viljin Tours og báturin, sum er keyptur í 2005, verður brúktur til at sigla við ferðafólki.

- Tað var eingin uppgangur í Syðradali í gjár, men hvirlurnar, sum komu suður ígjøgnum Kalsoyarfjørð, vóru rættiliga ógvusligar.

Magni sigur, at allur fjørðurin var í einari hvirlu, hvørja ferð hesar komu – og tær vóru títtar.

- Sagt hevur verið, at vindmegin í hvirlunum lá um einar 50 metrar um sekundið, men eg haldi, at hetta forslær einki í mun til tað, vit upplivdu her norðuri. Tað ráddi snøgt sagt um at leggja seg niður, tá hvirlurnar komu, sigur hann.

### Stórur skaði

Viljin fekk rættiliga stóran skaða og lak illa, har hann lá og slongdist í grótkastinum.

- Tað er serliga aftari partur niðanfyri vatnlinjuna, sum hevur fingið skaða, men fleiri smærri hol eru eisini á síðuni.

Magni sigur, at kjølur, skrokkur, skrúva, róður og aksil hava fingið skaða.

- Vit fingu bátin úr grótkastinum og yvir aftur til bryggjuna. Báturin hevur tveir motorar, sum eru 310 HK hvør. Ein mekanisk pumpa, sum pumpar eini 30 tons um tíman, stendur til henda motorin, men hon var minni enn so nóg mikið til at halda bátinum lens. Ziska kom okkum til hjálpar, og Brimil kom eisini á staðið. Tað vóru tvær pumpur úr Ziska, sum saman við pumpuni í Viljanum hildu bátinum lens.

Eftir at støðan var undir eftirliti, varð báturin fluttur og lagdur yvir í Ánir, har ein truckur tók hann upp.

Magni Garðalíð sigur, at Viljin er tryggjaður, og hann vónar, at tryggingin fer at dekka skaðan, sum helst verður rættiliga kostnaðarmikil.

- Eg kundi hugsað mær, at báturin verður umvældur á Strondum, men tað fari eg at tosa við tryggingina um, sigur báteigarin á Húsum.



*Ferðamannabáturin Viljin liggur og sleingist upp í grótkastinum í Syðradali, har hann fekk stóran skaða*